# ist ein aspest-marra

eina ferð ringir meklaravirkið aftur, hóast tey hvørja ferð lova, at tey skulu ringja aftur.

– Vit hildu nú, at tað heila tykist rættiliga óprofessionellt og óálítandi. Men vit bitu alt í okkum, tí um vit hildu út, endaði tað helst gott tað heila. Kanska fóru vit at sleppa inn til jóla..

## Váti veturin

Desember 2006: Tríggir mánaðir eru lidnir síðani fyribilsskeytið varð undirskrivað. Leigararnir flyta út, og ein oljumaður ringir og spyr, um hann skal fylla olju á tangan. Annar av seljarunum hevur upplýst honum, at Unn og Rógvi nú eru eigarar av húsunum. Men tey svara honum sum er, at tey eiga ikki húsini - hava hvørki lykil ella atgongd til tey. Onki er klárt enn, hvørki matrikulering, tinglýsing, skeytið ella gjald.

– Vit ganga ofta framvið húsunum, sum standa myrk og tóm. Tað sker í hjartað at síggja tað regna nærum óavbrotið hesar 4-5 mánaðirnar húsini standa køld.

Ummatrikuleringin verður ikki góðtikin í býráðnum, tí eitt av teimum trimum stykkunum lýkur ikki krøvini.

– Vit ganga í støðugum ótta fyri, um vit nú fáa húsini ella ikki. Hvat nú um fyribilsskeytið gongur út, og seljararnir knappliga fáa eitt betri tilboð? hugleiðir Unn.

So hvørt sum tíðin líður, sær alt púra vónleyst út, og tey umhugsa fleiri ferðir at sleppa sær burtur úr hesum, tí tað gongur alt ov long tíð.

– Hetta var ómetaliga særandi, tí vit høvdu skrivað undir eitt fyribilsskeyti, sum gav okkum forkeypsrætt upp á húsini. Og vit vóru nakað so spent at fara undir at innrætta okkara egna heim. Føldu at vit áttu tað, men kendu okkum máttleys, tí vit sluppu ikki inn.

--

Mars 2007: Kommunan góðkennir ummatrikuleringina, og húsini fáa nýtt matrikulnummar. Hetta eru 7 mánaðir eftir, at fyribilsskeytið er undirskrivað. Hini bæði stykkini eru nú 500 fermetrar í part, meðan tað hjá Unn og Rógva er minkað niður í 432 fermetrar. Unn spyr meklaran, um tey kunnu fáa endurgjald fyri at hava mist nærum 70 fermetrar av teimum 500 fermetrunum, sum virkið lýsti við upprunaliga, umframt at bíðitíðin hevur verið so long.

- Svarið frá meklaranum er, at ein annar keypari er áhugaður. So um vit eru ónøgd, kunnu vit bara hoppa frá. Men nú hava vit bíðað í meiri enn 7 mánaðar og orka

*Framhald á næstu síðu*



*Tað hevur regnað nærum óavbrotið síðstu 4 mánaðirnar, og tveir stórir vatnskaðar eru í húsunum, sum hava staðið køld allan veturin. So tað fyrsta tey gera, er at fylla oljutangan.*
*Hiti kemur spakuliga í húsini, og tey fara undir arbeiðið.*
*Fyrst taka tey tveir veggir niður.*
*Síðani fylla tey eina heila byngju av skrambli úr húsunum.*
*Tá tey skræða eitt skáp niður undir trappuni í gongini, so hon verður størri og ljósari, varnast ein vinmaður sum hjálpir til, eitthvørt løgið. Tilfarið minnir um aspest.*
*Um somu tíð koma tey eisini fram á svamp á ovasta lofti. Hesin hevur breitt seg innanfyri tapetið og niður eftir kaminuni, sum gongur niður ígjøgnum húsið og niður í køkin.*
*Tey halda fram við at ríva køk og baðiverilsi niður. Nógv tapet í gongini er vátt og dettur líkasum av sjálvt.*